# Fiskavirkini høvdu 25 milliónir í halli í fjør

**Fiskavirking einsamalt hevði 10-11 milliónir í halli í fjør, men Kósin í Klaksvík heldur tørn**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



At fiskavinnan í Føroyum gongur illa, er ongin loyna. Men nú eru eisini tey fyrstu tølini komin fyri, hvussu illa tað í veruleikanum stendur til í fiskivinnuni í Føroyum.

Og tey tølini vísa, at í fjør høvdu fiskavirkini í Føroyum tað ringasta árið í nýggjari tíð.

Felagið fyri ráfiskakeyparar hevði fund í farnu viku.

Formaðurin í felagnum, Egil Olsen, sigur, at útfrá tí, sum varð upplýst á fundinum, metir hann, at hallið hjá øllum fiskavirkjunum í landinum verður einar 25 milliónir í fjør.

Og so vánaligt hevur úrslitið hjá fiskivinnuni á landi ikki verið í nógv ár.

Egil Olsen vil ikki siga nakað um úrslitið hjá einstøkum virkjum.

Men aðrar keldur í fiskivinnuni fortelja okkum, at Fiskavirking einsamalt hevði eitt hall uppá 10-11 milliónir í fjør.

Hinvegin stendur so nøkunlunda upp og niður hjá Kósini í Klaksvík, tí har kláraðu tey so dánt at halda nullið.

### Vanligu virkini hava tað ringast

Hóast formaðurin í felagnum fyri ráfiskakeyparar ikki vil gera viðmerkingar til hesi tølini, sigur hann, at sum heild eru tað tey vanligu frystivirkini, sum hava tað tungt.

Hinvegin gongur heldur

*Fiskavirkini ganga so illa, sum tey ikki hava gjørt í fleiri ár og keldur í fiskivinnuni siga,at bara Fiskavirking hevði eitt hall upp á 10-11 milliónir í fjør*

frægari hjá saltfiskavirkjunum, tó at úrslitið als ikki kann sigast at vera nøktandi hjá teimum heldur.

– Summi av teimum hava nakrar hundraðtúsund í avlopi og tað er onki av teimum, sum røkkur eina millión í avlopi. Og tað vóru eisini onkur saltfiskavirki, sum góvu hall, sigur Egil Olsen.

Stóri trupulleikin hjá saltfiskavirkjunum í fjør hevur verið, at tað hevur verið so lítil toskur at salta og tað var júst toskurin, sum gav tann heilt góða prísin.

Egil Olsen ásannar, at sostatt er støðan hjá fiska virkjunum á landi alt annað enn góð.

– Hetta er sostatt annað árið á rað, at fiskavirkini á landi hava stórt hall. Í 2003 høvdu tey eitt hall uppá 15-17 milliónir og í 2004 verður hallið einar 25 milliónir.

Tað sæst eisini, at avleiðingarnar av vánaligu støðuni eru farnar at merkjast við tað, at onkur virki eru longu latin aftur.

– Men kemur ikki vend í heilt skjótt, stúrir hann fyri, at sum árið í ár fer at líða, er vandi fyri, at onnur virki eisini noyðast at geva skarvin yvir.

Formaðurin í ráfiskakeyparafelagnum sigur, at ein stór orsøk til tað vánaligu gongdina, er, at dollarin er so lágur og tað ger tað bíligari at keypa fisk aðrastaðni til marknaðin í Evropa og tað ger kappingina nógv harðari, eisini frá láglønarlondunum.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Fiskavirking. Men Óli Hansen, nevndarformaður í Fiskavirking, hevur áður upplýst fyri Sosialinum, at tey gera ikki viðmerkingar til roknskapartøl fyri aðalfundin.

Á Kósini vil Hanus Hansen, stjóri, heldur ikki gera viðmerkingar til roknskapartølini, fyrrenn á aðalfundinum.

# Venda gongdini við feskum fløkum og góðum flutningi

**– Vit hava nakrar fyrimunir, sum okkara kappingarneytar ikki hava og teir eiga vit at brúka, sigur Egil Olsen, formaður í felagnum fyri ráfiskakeyparar**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Beinleiðis flutningur ímillum Føroyar og Skotland er ein avgerandi fortreyt fyri at venda gongdini í fiskivinnuni á landi, heldur Egil Olsen, formaður í ráfiskakeyparafelagnum*

– Skal gongdin í fiskivinnuni í Føroyum vendast, er tað ein avgerandi fortreyt, at vit fáa betri flutning ímillum Føroyar og umheimin.

Tað staðfestir Egil Olsen, formaður í ráfiskakeyparafelagnum - enn einaferð.

Hann sigur, tí at eitt tað størsta bakkasti, sum føroysk fiskivinna hevur verið fyri seinastu nógvu árini, var, at skotlandssiglingin hjá Smyrli helt uppat.

Eina tíð ímeðan skotlandssiglingin var, var Egil Olsen sjálvur stjóri á flakavirkinum á Tvøroyri.

– Tað tíðina fluttu vit eini 120 tons av feskum flaki til Skotlands við Smyrli um vikuna.

Hann sigur, at nú eru tær fesku vørurnar bara ein viðfáningur.

Egil Olsen sigur, at hetta er júst kjarnin í teimum trupulleikunum, føroyska fiskivinnan hevur og hetta er eisini høvuðslykilin til at venda gongdini.

– Vit noyðast at leggja dent á teir fyrimunir, vit hava framum láglønarlondini. Og tað er júst, at vit eru so tætt við marknaðin ogtí kunnu selja teimum spillfeskar vørur.

– Tann fyrimunin skulu vit brúka. Men skal ta bera til, verður eisini neyðugt við góðum flutningi.

Men tað heldur Egil Olsen ikki, at føroyingar hava ásannað enn, hóast tað er ávíst mangar ferðir.

Hann ivast onga løtu í, at ein stór orsøk til afturgongdina í Suðuroy seinastu árini, er, at skotlandssiglingin helt uppat.

– Skulu vit gera okkum vónir um at kunna selja feskar vørur í størri mun, verður neyðugt at fáa nógv betri flutning ímillum Føroyar og Skotland og tí eigur tann trupulleikin ikki at vera undirmettur, sum hann viðhvørt hevur varhugan av, at hann er.

Hann nevnir at íslendingar eru farnir at flúgva fisk á marknaðin hvønn dag og tað hevur gjørt, at teir hava lagt seg á ein stóran part av marknaðinum.

Ti heldur Egil Olsen, at tað verður alneyðugt at fáa betri samband fleiri ferðir um vikuna við báti og helst eisini við flogfari.

Hann ásannar, at tað er dýrt at flúgva við fiski. Men ein trupulleiki er, at næstan allur okkara innflutningur er úr Danmark. Sostatt mugu flogførini flúgva, har tey kunnu fáa vørur heimaftur við, tí annars loysir tað seg slett ikki. Men at flúgva til Keypmannahavnar og lossa vøruna víðari haðani frá upp í treylarar ella onnur flogfør, er ikki tað rætta. Fiskurin skal flúgvast so nær marknaðin sum gjørligt.

– Men vit sóu, at táið Smyril sigldi til Skotlands, fóru vit eisini at flyta vørur inn úr Skotlandi.

Egil Olsen sigur, at hetta er íløga í framtíðina og hetta er at skapar karmar fyri vinnulívið. – Verður tað neyðugt, eigur landskassin sostatt at spjaða til, fyri at at flutningssambandið verður álítandi og trygt og ikki dettur niðurfyri aftur eftir stutta tíð.

### Samstarv ímillum skip og virki

Hann heldur eisini, at tað verður neyðugt at endurskoða sambandi ímillum skip og virki.

– Í dag verða skip og virki rikin fullkomiliga hvør sær, men hetta verða vit noydd at endurskoða. Tað, sum hevur størstan týdning fyri marknaðin, er, at hann fær leveringstrygd fyri tað, hann vil hava. Men sum er, vita virkini í Føroyum ongantíð, hvørja rávøru tey fáa, tí skipini kunnu vera vekk nær sum helst, um tey halda, at tað akkurát tá loysir seg betri at avreiða onkra aðrastaðni.

Egil Olsen vísur á, at fyri tað er ikki sagt at skip og virki skulu leggjast heilt saman.

– Tað finnast nógvir millumvegir og undir øllum umstøðum er tað alneyðugt at fáa betri samstarv ímillum skip og virki.

– Betri flutningssamband við Skotland og økt samstarv ímillum skip og virki, eru tveir spurningar, sum vit ikki sleppa undan at viðgera, sigur Egil Olsen, formaður í felagnum fyri ráfiskakeyparar.